# Koyrdi bil til hann var

**Sjálvt um hann nærkast 100 árum, so er Diurin framvegis virkin á mangan hátt. Hann heldur urtagarðin, hevur júst málað garð og koyrdi til fyri kortum**



*Hendan bilin hevur Diurin havt í 29 ár, inntil hann nú er 98 ár*

**ALDURDÓMUR**

*Óli Jacobsen*
*olij@sosialurin.fo*

Vit vóru um dagarnar inni hjá Andreas Djurhuus, vanliga kallaður Diurin, sum er ættaður úr Porkeri, men hevur búð í Havn í mong ár. Diurin er føddur 22.januar 1909, og hetta merkir, at hann nú er nærri teimum 99 árunum enn 98. Men tað merkist ikki nógv til aldur. Hann hevur koyrt bil til fyri kortum. Eyguni eru góð og millum annað lesur hann við áhuga Miðvikuna í Sosialinum.

Hann arbeiðir eisini uttandura. Hann hevur júst málað stakittið og er eisini í havanum, sum hann heldur væl.

Diurin er sonur Olavus úr Skemmuni og Elsebeth Súsannu av Nesi í Porkeri, sum nú er Nes í Vági.

Pápin hevði handil, men hann var eisini til skips, og tá passaðu móðir og systir Diin handilin. Olavus handlaði fyrst Jaspur á Løghamri í Vági, og síðan fyri seg sjálvan. Ein handil var ikki bert ein handil. Hann tók eisini móti fiski. Handlarnir í Porkeri tóku nógvan saltfisk til turkingar, sum gav nógv arbeiði í bygdini.

Diurin hevur upplivað stórt sæð alla menning í landinum. Telefon var tó í Porkeri fyrst hann minnist. Men vegur var eingin. Hann minnist væl, tá ið vegasamband kom til Vágs, og tað var ikki fyrr enn langt seinni, at vegur kom til Tvøroyrar. Tí minnist hann eisini fyrsta bilin, sum kom í bygdina, og var hetta ein lastbilur hjá Dias av Heyggi, sum var kendur reiðari í Vági, men sum var ættaður úr Porkeri. Diurin minnist, hvussu maður fór av húsi at síggja hetta undur.

Diurin minnist eisini fyrsta heimsbardaga 1914-1918, har tann mest ítøkiliga avleiðingin fyri gerandisdagin var, at tað gjørdist neyðugt at fara at dyrka korn og at fáa kornið til mjøl. Tá vóru fleiri sornhús í Porkeri.

Eitt annað minni frá hesum tíð er eitt norskt skip, sum sakk, og manningin róði til Porkeris. Við sær høvdu teir eisini skipshundin, Pam, sum var verandi í Porkeri.

## Nógvar vanlukkur

Hetta var eisini ein tíð, tá stórar vanlukkur hendu á sjónum, sum raktu meint, eisini í Porkeri. Í 1910 fórst Norðstjørnan úti á Bankanum við 11 monnum. Av hesum vóru 9 porkeningar, har nógvir vóru í ætt, og í 1914 fórst Robert Miller. Hon fór av Havnini 13. Mars. Hon skuldi undir Føroyar og helst á Bankan, men spurdist ikki aftur. Tað seinasta sum varð sæð til skipið var tá teir settu segl av Bankanum til Íslands. Sagt verður, at 24. og 25. mars var eitt rættiligt ódnarveður undir Íslandi og kunnu teir vera farnir tá. Skipari var tann bert 22 ára gamli John Danielsen. Ein annar porkeningur við var beiggi Diin, Petur Hans, sum bert var 15 ára gamal. Seinni aftur eru enn fleiri porkeningar farnir á sjónum, ikki minst undir krígnum, tá Porkeri var ein tann harðast rakta bygdin.

Porkeri var ein fiskimannabygd burturav, har eisini nógvir skiparar vóru úr Porkeri. Ein røð av húsum í bygdini verður kallað »skipararekkjan«.

## Sildabátarnir

Diurin veit væl at greiða frá teimum sokallaðu sildabátunum, sum tað vóru nógvir keyptir av til Føroyar og eisini til Porkeris og Vágs. Bátarnr vóru kallaðir soleiðis, tí teir vóru upprunaliga nýttir av skotum til veiðu av sild við gørnum.

Olavus, pápi Diin, var við til at keypa ein tann fyrsta sildabátin til Porkeris i 1906, Isabella Innes.

Tá ið teir vóru keyptir høvdu teir einki lugar, bert eina stóra kahýtt. Manningingartalið hevur helst ikki kravt meira enn tað. Tá so skipini komu til Føroya máttu lugar gerast. Ikki var keypspeningurin stórur, bert kr. 900. Teir vóru 6 partareigarar, sum settu í kr. 180 í part.

Skipini vóru ikki stór. Tey fyrstu tóku 150-160 skippund, og tey seinnu nakað meira, 200 skippund. Manningin var eisini hareftir einir 10-12 menn, og var hetta nógv minni enn við sluppunum.

Seinni skip av hesum slagnum sum komu til Porkeris vóru Jane & William, Familiess Pride og Vigelant, sum systkinabarn Diin, Petur í Skemmuni, sum var fluttur til Vágs, átti saman við fleiri porkeningum. Sum tað sæst varðveittu skipini sínu upprunaligu ensku nøvn. Tað vóru eisini fleiri sildabátar í Vági og aðrastaðni við. Eitt av sildaskipunum, sum gjørdist sera kent, var Coralia, sum partur av dramatisku hendingini við Blithsome mitt í 30-unum.

Olavus førdu Isabellu Innes tey fyrstu 10 árini, men skipið var skotið niður av týskum kavbáti í 1917 undir 1. heimsbardaga á Mýlingsgrunninum, samstundis sum onnur skip vórðu skotin niður á Bankanum. Bankin var av týskarum lýst sum vandaøki, men hildið verður ikki, at Isabellu Innes var í vandaøki. Men hesin ivi kom teimum ikki til góðar, og tí fingu teir einki frá tryggingini. Hetta var sjálvsagt ein smeitur, men skipið var bíligt og goldið. Tá hetta hendi var Petur Frederik Petersen, ættaður úr Funningi, skipari. Teir vóru so nær landi, at teir høvdu bert róð ein hálvan tíma, tá ið teir síggja Munkin.

## Veiddu agnið sjálvir

Teir royndu annars nógv á bankanum, har tað var nógvur fiskur tá. Men annars royndu teir eisini nógv undir Íslandi. Teir royndu mest norðanfyri Langanes. Her var lættari at fiska, tí tað var grynri vatn.

Sjálvur fór Diurin til skips 15 ára gamal við Jane & William, sum var ein